# Viðmerking: Ræðisrættur og fígging

GORDON EJDESGAARD



Kundi hugsað mær at komið við einum ískoyti til kjakið á Tingi mánadagin. Evnið var m. a sum omanfyri nevnt.

Principielt er sakin henda: Eitt hvørt virki skal hava fígging til sítt virksemi. Uttan fígging er jú ikki talan um nakað virksemi. Fígging er ressourcir sum skulu til at virki yvirhøvur er í gongd. Talan kan vera um eginfígging ella fremmanda fígging. Ella um ein vil: eginpeningur ella fremmanda peningur.

Eginpeningur er partapeningur + flutt yvirskot. Fremmandur peningur er t. d. eitt bankalán.

Trupulleikin hjá nøkrum undir orðaskiftinum tyktist at vera, at fremmandur peningur ikki er av tí besta: vit missa ræðisrættin.

Eingi krøv eru til forrentningav partapeningi/eginpeningi. Men til forrentning av fremmandum peningi/lánum: nevniliga tað sum sambart lánsskjølunum er avtalað. Harafturímóti hevur partapeningurin fullan ræðisrætt, væl at merkja um ein kann gjalda tað ein skal sambært lánsskjølunum. Lánsveitarin hevur ongan ræðisrætt. Leiðslan í Føroya Banka avgerð jú ikki hvat fólk skulu eta til døgurða.

Samanber við kreppuna í ’92. Hvør ráddi fyri borgum áðrenn skrædlið? Hvør fíggjaði? Hvør misti ræðisrættin? Hvør hevur fingið ræðisrættin aftur?

Eru vit tvingað at taka lán kann væl hugsast at ræðisrætturin fer av hondum. Men ikki annars.

Nú er væl høvuðstrupulleikin, at menn fara inn á eitt búskaparliga fakliga teknist (trupult) øki. Og vilja seta avmarkingar út frá moralskum ella politiskum kriterium. Altso at útlendingar, hvør tað so er, ikki skulu eiga meira enn ein ávísan part.

Nú kundi eg eisini hugsa mær at spurt: hvat er ein føroyingur í hesum sambandi? Fastbúgvandi sambært fólkayvirlitið? Hvat við dønum, skulu teir teljast við? Hvat við grønlendingum? Skulu teir teljast við? Teir eru jú ikki útlendingar.

Er Danmarks Skibskreditkreditfond ”útlendskur” peningur? Soleiðis kundi eg hildið fram.

Hvat merkir so ræðisrættur. Hann kann jú avtalast og broytast dag frá degi. Og hetta síggja vit hvønn dag innan virkini. Partabrøvini verða seld á partabrævamarknaðinum hvønn dag.

Tingmenn vassa langt út við at brúka hugtøk, sum ikki kunnu operationaliserast ella mátast. Og uttan at hava definitiónir.

Óansæð hvat, so kann og skal vinnulívið ikki stýrast og kontrollerast av Tinginum. Og hvat nú við teimum 4 frælsunum? M. a. fríur kapitalflutningur millum lond.

So orðið ræðisrættur er aldeilis ónýtiligt, tí tað kann ikki brúkast inna búskap ella jura av tingmanningini. Men av virkjunum hvønn dag.

At útlendingar geva vinnuni lán er sjálvandi í lagi. Tað gevur als onga meining at føroyskir peningastovnar skulu fíggja allan flotan. Tað royndi Sjóvinnubankin fyrst í 50’unum. Úrslitið er vælkent.

Og at enda: segði nakar nýggjur planbúskapur.

# Til Jenis av Rana, Karsten Hansen, Alfred Olsen, Annfinn Kallsberg og Gerhard Lognberg

NINA DAHL

§ 266b er vedtaget af et parlamentariskt flertal i lagtinget. 17 for og 15 imod – så kan man mene, hvad man vil.

Men at folkevalgte politikere, der er valgt ved demokratisk frit valg, nu vil underkende lagtingets beslutning, siger mere om dem, for det er demokratiet, som er grundstenen under samfundet, og ikke § 266b, som de sætter spørgsmåltegn ved.

Vi har et repræsentativt demokrati. Vælgernes indflydelse består i at vælge blandt de opstillede partier og opstillede til lagtinget.

De folkevalgte skal tage initiativ til lovforslag, behandle og beslutte samt føre lovgivningen ud i livet, ikke vælgerne, så havde man haft et direkte demokrati. Så meget burde I vide – men tak, et har I så fortalt, at I ikke anerkender og respekterer demokratiet. Og det må man så huske ved næste valg.

Endelig kan der henvises til FN’s Menneserettighedserklæring, der ikke er en forpligtende konvention, men som er grundtankerne bag det internationale demokratiske samfund, som Færøerne tilstræber at blive en del af i Vision 2015.

Artikel 7: Alle er lige for loven og har uden forskelsbehandling af nogen art lige ret til lovens beskyttelse. Alle har ret til lige beskyttelse mod enhver forskelsbehandling i strid mod denne erklæring og imod enhver tilskyndelse til en sådan forskelsbehandling.

# Átrúni og politikkur

EYÐUN MOHR VIDERØ



Tað stóðst reiðiligt rok í løgtinginum av uppskotinum um at skoyta uppí grein 266b í revsilógini um verju av ávísum bólkum í samfelagnum, og í hesum føri snúi tað seg um homoseksuel. Eg havi eitt sindur ilt við at skilja, hvar munurin er millum tey, ið neyðugt er at nevna í lógartekstinum, og so tey ið ikki er neyðugt at nevna serskilt, fyri at fólk kunnu verða vardur ímóti ágangi av hvørjum slag, tað so er. Vit eru gjørd kunnug við, at í einum ávísum føri hevur persónur verið fyri ágangi fyri sín kynsliga verumáta bæði í orðum og kropsligari viðferð, men sagt verður, at politiði ikki kann reisa ákæru, tí mál sum hetta er ikki greitt nevnt í revsilógini!!?? Hvat eigur so at verða gjørt í okkara rættarsamfelag, so tílíkt ikki kann gerast óstraffað? Sjálvur eri eg ikki nóg lógkønur at taka avgjørda støðu um hetta, men ymiskar loysnir hava verið nevndar av okkara løggevarum í lógarsmíi. Í hvussu so er útnevndu tveir politikkarar seg sjálvar til talsmenn og verjar fyri tey homoseksuellu, at greinin í donsku revsilógini hesum viðvíkjandi eisini skuldi vera galdandi í Føroyum, og tí komu tey við uppskoti um hetta. Verri gekst, tá málið kom fyri løgtingið. Nú fóru onnur í herna ímóti uppskotinum, tí hetta serskilda átak beinleiðis stríðir ímóti ásetingum og siðalæru í Halgubók.

Hvar eru vit nú stødd? Flestu okkara eru samd um, at náttúrliga sambandið millum kynini er millum mann og kvinnu. Tíverri er tað soleiðis í ávísum førum, at nøkur ikki hava hetta náttúrliga sambandið kynjanna millum, og sagt verður, at tú hevur ikki avgjørt hetta sjálvur, men er “føddur” soleiðis. Aðrir trupulleikar hjá fólkum eru eisini at síggja í hesum “fødda” høpi, sum t. d. at onkur hevur trupulleikar av alkoholi, sum viðkomandi er “føddur” við, onnur við tjóðalyndi o.s.fr. Okkara siðasinni sigur okkum í nógvum førum, hvat vit skulu halda um alt, men í flestu førum mugu vit hava okkurt at stíðja okkum til, fyri at vera før fyri at taka støðu, og mær kunnugt er onki tryggari enn okkara bíbil, hóast okkara vesælu evni at fylgja henni! Tí haldi eg, at tað er skeivt at siga, at tað ikki er rætt at halda politikk og skriftina saman, men hetta skal ikki skiljast sum tað sama sum at halda politikk og átrúna saman! Tá verður pappírið í bíbliuni nýtt til at sláa hvønn annan við, meðan innihaldið ikki er við! Rok hevur staðist í Tjóðveldisflokkinum, tí flokkurin er skildur, tá Karsten Hansen sambært síni andaligu sannføring ikki kundi fylgja restini av flokkinum, men meldaði seg út. Karsten verður hildin vera ein róligur og heiðurligur persónur, sum ikki tekur sovorðin stig fyri at gera seg sjálvan upp. Í dimmalætting 19. des. verður formaður floksins Høgni Hoydal endurgivin fyri at siga, at tað er “bæði ørkymlandi og álvarsligt, um vit fara at býta løgtingslimir upp eftir trúgv..” og “Vit skulu taka avgerðir um politikk og ikki átrúnað.” Tingmaður floksins í Sandoy hevur ásannað, at hann kundi fáa trupulleikar við baklandið – veljarar - men hann vildi fylgja síni sannføring og atkvøddi fyri uppskotinum! Tjóðveldisflokkurin hevur havt størri trupulleikar enn aðrir flokkar í hesum føri, men tíverri sær út til at teir ikki hava henda trupulleika, tá Karsten er farin. Nú hoyrist í fjølmiðlunum, at avgerðin hjá løgtinginum skal sendast til fólkaatkvøðu, vísandi til áseting í uppskotinum til stjórnarskipan Føroya, sum hvørki er samtykt av løgtingi ella fólkinum. Tað er helst bert hetta, ið vantar í, at hurlivasin er fullkomin!

20.12.06

# Sosialurin eigur at kenna mørk

ÓLAVUR Í BEITI



Hevur Sosialurin heitt á CJJ um at ummæla bókina »Burtur«, ella hevur høvundurin gjørt tað av sínum eintingum? Hetta er ein spurningur sum eg vóni at redaktiónin á Sosialinum svarar mær.

Er tað veruliga so, at Sosialurin hevur biðið CJJ ummæla eina bók, so eri eg stórliga skuffaður av hesum blað, tí so hevur blaðið – væl vitandi – biðið um at fáa ummæli á slíkum støði! Nú hevur Hanus Kamban skrivað sína meting av hesum slagi av ummæli og grundgevur fyri, hví hesin meiaristurin skrivar soleiðis, so tað er óneyðugt hjá mær uppaftur at siga mína meting! Hana havi eg eisini skrivað um í viðmerkingini sum fyrst stóð í Oyggjatíðindum tann 20. desember undir yvirskriftini: Meiarí-filosoffurin.

Vit skrivandi hava ikki brúk fyri hesum slagi av ummælum, og eg hugsi at redaktiónin á Sosialinum eigur at rætta sovorðin “ummæli” til at vera lesarabrøv! Eg havi gjørt mítt kanningararbeiði og spurt eitt starvsfólk á Sosialinum, um blaðið hevur heitt á henda meiaristin at ummæla, men viðkomandi dugdi ikki greitt at svara, men helt at CJJ hevði sent tað inn av sínum eintingum!

Er tað so, so kunnu vit rættiliga staðfesta, at maðurin er ikki rættsiktaður! So er hann uppaftur verri statt enn eg skrivi um í míni viðmerking: Meiarífilosoffurin! Men Sosialurin hevur eisini eina ábyrgd at rætta sovorðin “ummæli” - at flyta tey yvir til lesarabrøvini!

Nú vóni eg at góði vinurin og ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller, tekur sær stundir at svara hesum spurningi: Hevur Sosialurin heitt á Carl Jóhan Jensen um at ummæla bókina Burtur?

**Viðmerking:**
Sosialurin roynir eftir førimuni at fáa fólk at ummæla tær mongu bøkur, sum verða givnar út. Millum hesar mongu ummælarar er eisini Carl Johan Jensen.

**Jan Müller,**
**blaðstjóri**

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað
loysir
seg